# Trøllapætur og omman til Íslands



*Umfremt fløguna, sum nú er á íslendska marknaðinum, vilja menninir handan íslendska Music eisini gera eina íslendska útgávu av seinasta filminum um Trølla-Pætur*

**Nú skal føroyska barna-konseptið við Trølla Pæturi og ommuni veru-liga standa sína roynd. Eftir fyrstu fløguútgávuna, vilja íslendingar nú hava bæði film, nýggjar fløgur og sítt egna trøllapar**

TRØLLA PÆTUR
*Jákup Mørk*

Fyri tveimum vikum síðani kom íslendskt útgáva av fløguni hjá Kularótum og Trølla Pæturi á marknaðin. Tað er íslendska Music, sum hevur staðið fyri útgávuni, og eftir øllum at døma hevur móttøkan av hesum verið góð.

Og í øllum førum, so tykj-ast menninir handan Music at vera sannførdir um, at tað í Føroyum so sera væl umtókta konseptið væl og virðilga kann bera til í Íslandi.

Eftir bara tvær vikur á marknaðinum, tykist veru-ligur eftirspurningur eisini at vera eftir Trølla Pæturi og ommuni. Og í flogfarinum í dag fóru tey bæði til Íslands, har fleiri framførslur standa á skránni.

## Vilja keypa konseptið

Og tað eru ikki bara fram-førslur, sum standa á skránni. Niklas Heri Jákupsson, sum er høvuðsmaðurin handan Trølla Pætur, váttar, at íslendski áhugin tykist sera ítøkiligur.

Fyrst og fremst, so fara Emil Gunnarstein (Trølla-omman, bløm.) og eg hava fleiri framførslur í Íslandi. Men hartil, so koma tveir íslendingar eisini at fylgja okkum, soleiðis at vit kunnu læra hesar upp í leiklutinum sum Trølla Pøtur og omm-an.

*Vil tað siga, at íslendingar meira ella minni koma at keypa konseptið?*

- Ja. Talan skal so at siga vera um júst sama konsept, og tí er eisini týdningarmikið, at teir íslendingarnir, sum koma at hava leiklutin, koma at líkjast okkara konseptið so væl, sum tað yvir høvur er gjørligt. Snøgt sagt, so skulu vit læra teir at kenna samleikan hjá Trølla Pæeturi og ommuni, soleiðis sum vit hava bygt hetta upp.

Umframt at tað soleiðis helst verður talan um hópin av trølla-showum í Íslandi, so sigur Niklas Heri, at Music eisini er sera áhugað í teimum útgávum, sum higartil hava verið í Føroyum.

- Nú vil eg ikki sláa tað alt ov stórt upp. Men teir siga í øllum førum, at sølan av fyrstu fløguni hevur gingið hampuliga væl. Nú vilja teir so fáa loyvi at geva fløguna um føðingardagin hjá Trølla Pæturi út í Íslandi, umframt at teir eisini vilja framleiða seinasta filmin hjá okkum á íslendskum.

## Líka ríkur sum Ossi

Hóast einstøk dømi eru um tí, sum líkist útlendskum gjøgnumbroti, so er ein føroysk show-bizz søga, sum endar sum ein succés, er ikki akkurát tað, sum føroyingar eru mest vanir við. Sjálvur tykist Niklas Heri eisini at vera hampuliga varin, tá tos-að verður um, hvørjar vónir hann hevur um hetta. Men hann leggur samstundis dent á, at hann eina sera stóra til-trúgv til hetta.

- Tú kanst kalla tað eina barnatrúgv, sum eg havi hesum viðvíkjandi. Her heima hava børnini í øllum førum tikið hetta fult og heilt til sín. Og sjálvur havi eg hugsað, at um 90% av føroyskum børnum dámar hetta. Hvussu er tað so í Noreg, Íslandi, Danmark og aðra staðni við. Kunnu vit koma út til 60% ella kanska bara 30% her, so er tað jú so nógv størri, enn tað kann verða her í Føroyum. At kon-septið er nóg gott, ivist eg onga løtu í. Men tað er tó langur vegur frá hesum og so til marknaðin. Júst tí eri eg eisini sera spentur upp á hetta í Íslandi, tí riggar hetta væl, so kann tað stytta munandi um leiðina til aðrar marknaðir, heldur hann.

Enn er tað tó ikki so, at Trølla Pætur er vorðin eins ríkur sum Ossi av hesum ævintýrinum. Men hóast Niklas Heri ikki tykist hava ríkidømi sum eitt mál í sjálvum sær hesum viðvíkjandi, so tykist hann hava vónir um, at hetta kann kasta nakað av sær.

- Tað er sjálvandi so, at tá vit eiga konseptið, so eru tað eisini vit, sum kunnu forvinna nakað við hesum. Hinvegin, so havi eg ongar ætlanir um at krevja somikið nógv, at projektið skal kollsigla. Fyrst og fremst, so haldi eg tað vera stuttligt, um vit á hendan hátt kunnu røkka enn longur, men tað sigur seg sjálvt, at vit ikki bara fara at avhenda hugskotið fyri einki. Men alt hetta er so ein spurningur, sum vit fara at tosa um, nú vit fara til Íslands, staðfestir hann at enda.

Vit kunnu at enda nevna, at vil lesarin hoyra, hvussu Trølla Pætur ljóðar á íslendskum, so er hetta eingin trupulleiki. Við at fara á slóðina, www. katirkrakkar.is og trýsta á »hlusta«, ber til at hoyra Tröllа-Pétur syngja sangin, sum veruliga gav honum gjøgnumbrotið her í Føroyum. Um talan við hesum so eisini um íslendska gjøgnumbrotið fer tíðin at vísa.


Hi-Fi



damor

Keysmart 28" sjónvarp



- Tekstvarp
- Sera einfalda menu v/equalizara
- 2 Scart stikk

2.498,-

Keysmart 20" sjónvarp



- Front ingangir til Playstation
- Scart stikk
- Tekstvarp og fjarstýring

1.398,-

Thomson DVD v/ Divx



798,-

Spælir m.a. DVD/CD/MP3/DivX

LG DVD/Video Kombinerað



1.498,-

Nicam Stereo, LP, 4 videohøvd, DVD, CD, MP3

JVC Boomblaster



2.998,-

Sera kraftigur boomblastari
Við subwoofara, 2 x 30 W
Spælir fløgur, kassettubond og radio

Stórt úrvæl av MP3 Avspælarum



- Við og uttan radio

úr 298,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001

damor